SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

BILAR

# Bilrøkt keypt leigubilarnar hjá Wenzel

**Við keypinum av leigubilunum hjá P/F Wenzel hevur Sp/f Bilrøkt nú eitt breitt úrval av ymiskum tænastum til bileigarar og til teirra sum ynskja at leiga sær ein bil. Leigubilarnir verða marknaðarførdir undir navninum "Car Rental"**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*


*Geir Wardum og Jákup á Borg, sum eiga og reka Sp/f Bilrøkt, hava keypt leigubilarnar hjá P/F Wenzel*

Sp/f Bilrøkt hava enn einaferð víðkað sítt virksemi. Nú hava teir keypt leigubilarnar hjá P/F Wenzel. Talan er um eitt breitt úrval av bilum til ymisk endamál – eisini vørubilar.

Leigubilarnir verða marknaðarførdir undir navninum "Car Rental", ið er ein tænasta til bæði Ford-kundar og øll onnur, siga Jákup á Borg og Geir Wardum, sum eiga og reka Sp/f Bilrøkt í Pedda við Steingøtu í Havn.

Frammanundan hava Bilrøkt klárgering av bæði nýggjum og brúktum bilum hjá P/F Wenzel um hendur.

Ein onnur tænasta hjá Bilrøkt er "Car-cosmetic", ið er polering, reinsan og lakkforsegling av bilum. Eisini hava teir eina hjálpar- og flutningstænastu við einum bili, sum fólk kunnu ringja eftir alt samdøgrið.

Umframt tað hava teir eisini ein mekaniskum bilverkstað og dekksølu. Verkstaðurin er útgjørdur við nútímans dekk- og balanseringsmaskinum, og teir skaffa øll sløg av dekkum.

Bilrøkt er eisini ein brúktbilasøla. Í tí sambandi verður konseptið nú broytt soleiðis at teir ístaðin fyri at selja bilar fyri fólk, fara teir nú at keypa brúktu bilarnar og síðan seta teir til sølu, siga Jákup á Borg og Geir Wardum, sum leggja afturat at teir altíð eru til reiðar við einum góðum tilboði upp á at gera bilin vetrarkláran.

Meira fæst at vita á heimasíðuni: www.bilrokt.fo ella við at venda sær til Sp/f Bilrøkt, Pedda við Steingøta 26, tel. 588880 / 588881

Ivan Johansen Bilar:

# Endurnýggjað ISO góðskuskipanina

**Fríggjadagin 8. desember 2006 var øll ISO góðskuskipanin hjá P/F Ivan Johansen Bilum endurcertifiserað, tá umboð fyri Det Norske Veritas, saman við umboðum fyri leiðsluna hjá P/F Ivan Johansen Bilum gjøgnumgingu góðskuskipanina hjá bilasøluni við Hoyvíksvegin í Havn.**

CERTIFIKAT

Ásetingarnar í góðskuskipanini krevur, at skipanin verður gjøgnumgingin árliga, men triðja hvørt ár er stóra endurcertifiseringin á skránni, og tað var hetta, sum var á breddanum fríggjadagin 8. desember 2006. Gjøgnum dagin bleiv skipanin gjøgnumgingin: á verkstaðnum, á bilasøluni, á goymsluni og í leiðsluni.

Tá dagurin var at enda komin, var ein avsluttandi fundur har tikið bleiv saman um. Úrslitið eftir áhugaverdar samrøður og staðfestingar var at P/F Ivan Johansen Bilar fekk endurnýggjað ISO certifikatið.

### ISO – gagnligt, bæði fyri kunda og fyritøku!

"Vit kunnu staðfesta at ISO skipanin, bæði er gagnlig fyri okkum sum veitarar av tænastum og eisini fyri kundan. Sjálv skipanin er ikki eitt endamál í sær sjálvum, men er hinvegin eitt amboð, sum kann nýtast at fremja góðskustøðið", sigur góðskuleiðarin hjá Ivan Johansen Bilum, Áki Andreasen. Jón Johansen, stjóri, leggur eisini afturat, at við dagligum eftirlitið á gjørdum arbeiði á verkstaðnum hava vit eftirlit við tænastuni vit veita; umframt hetta er hugaligt at hava møguleikan at fáa meiningina hjá kundunum at vita, og sipar til spurnaðarskemaðini, sum kundar fáa og kunnu senda innaftur til Ivan Johansen Bilar. Hetta seinasta er eisini ein eyka trygd at fáa møguligar snøklar fram.

### Starvsfólkasamrøður og skipaði viðurskifti

Ein annar táttur eru árligu starvsfólkasamrøðurnar , har starvsfólk og deildarleiðari taka eitt prát um arbeiði, arbeiðskarmar og viðurskifti, sum kunnu vera viðkomandi fyri starvið hjá tí einstaka, starvsfólkinum. Yvirlit yvir veitarar, galdandi avtalur – amboð, eftirlit við amboðum o.s.fr eru eisini grundleggjandi partar av ISO skipanini.

Í dag starvast 22 fólk hjá P/F Ivan Johansen Bilum.




# Bilatorgið



**BMW 316i**
Silvur 1999, 91000 km. 119000 kr. Sóltak, cd, el-rútar, -spegl, alufelgir, spoilara, er sera væl hildin og sær gott út. Fyrr prísur: 139.000 kr.



**Fiat Punto**
Bláur. 2003. 48000 km. 59000 kr. Cd, el rútar, í góðum standi. Fyrr prísur: 89.000 kr



**Ford Fiesta**
1995, 161000 km, 19000 kr. Góður og bíligur DIESEL bilur.



**Toyota Avensis 1.8i 5h Terra**
Silvur. 1999. 193000 km. 69000 kr. Cd, el rútar-spegl, cd, hita í forrútinum. Fyrr prísur: 89.000 kr



**Rexton Xdi270 Turbo Diesel**
Hvítur 2006, 3000 km, 310000 kr. Aut gear, air cond, kromgáttir, eyka dekk á felgum, krom kúfangara, org tónadar rútar, Mercedesmotor, 4x4, cd/mp3/fm radio. Vørubilur. Bíligari bilur kann ganga í býti.



**Peugeot 406 3,0. V6**
Silvur. 2001. 0 km. 155000 km. Klima, bl. leðursetur, el rútar-spegl, hita í setrunum, cd, koyriteldu. Sær gott út og kraftar sera væl. Fyrr prísur: 165.000 kr.



**Toyota Yaris**
Silvur. 2001. 93000 km. 79000 kr. El-rútar, cd, tónaðar rútar.

BILRØKT
BILROKT.fo v/Jákup á Borg
Varðagøta 77 · FO-110 Tórshavn
tel: 58 88 80 · bilrokt@bilrokt.fo